**Føroya Kærustovnur**
Almanna-, skatta-, toll- og MVG-mál

## Løgfrøðingur

Til setan 1. mars 2000 ella skjótast tilber, verður søkt eftir løgfrøðingi til Føroya Kærustovn. Setanin er fyribils hálva tíð, men væntandi seinni í árinum fulla tíð.

**Høvuðsuppgávurnar hjá løgfrøðinginum verða:**
- at lýsa og viðgera kærur frá borgarum og fyritøkum
- at gera kærunevndunum tilmæli um avgerð
- at hava samskifti við kærarar og stovnar innan kæruøkini
- at luttaka í gerð av ársfrágreiðingum og avgerðaryvirliti
- at undirvísa á skeiðum.

**Førleiki**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv, kunna arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum um størri arbeiðsuppgávur. Tað er ein fyrimunur, at hava arbeiðsroyndir innan almenna fyrisiting og/ella privata arbeiðsmarknaðin sum løgfrøðingur.

**Vit bjóða**
- spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga við góðum møguleikum fyri samskifti úteftir bæði í Føroyum og við onnur Norðurlond
- flex-tíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi
- góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanin er á Føroya Kærustovni, men at setanarøkið fevnir um Føroya Kærustovn og Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum, C.V., ummælum o.ø. verða at senda til

**Føroya Kærustovn**
Skálatrøð 20 – Boks 45
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Føroya Kærustovni í hendi í seinasta lagi **22. februar 2000 kl. 16.00.**

Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við Gurið Joensen, stjóra á tlf. 350585 fyri at frætta nærri um starvið.

**Um stovnin**
Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Løgmansskrivstovuni og fyrireikar kærumál til kærunevndirnar í almannamálum, mvg. málum, skattamálum og tollmálum. Á stovninum starvast í løtuni 4 fólk: stjórin, ein løgfrøðingur og tvey skrivstovufólk.

**Nýggjar TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

# Breiða semjan hevur týdning

*Men Fólkaflokkurin skal ikki leypa frá avtalunum í samgonguni og gera eina breiða semju um fullveldismálið við andstøðuna, heldur fyrrverandi formaður Fólkafloksins*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fólkaflokkurin skal verða loyalur yvir fyri avtalunum, sum eru gjørdar í samgonguni, og tí skal hann ikki taka av fríggjaratilboðnum frá Sambandsflokkinum.

Tað heldur fyrrverandi løgmaður og formaður fyri Fólkaflokkin, Jógvan Sundstein.

– Fólkaflokkurin hevur skrivað undir eitt samgonguskjal, og flokkurin hevur gjørt eitt upprit, sum flokkurin skal verða loyalur yvir fyri.

Í Sosialinum í gjár segði Trygvi F. Guttesen, næstformaður í Sambandsflokkinum, at breiða semjan í fullveldismálinum finnist millum andstøðuna og Fólkaflokkin.

Hetta hava aðrir andstøðupolitikkarar eisini havt frammi fyri kortum, og formaður Javnaðarfloksins avvísti ikki hesum møguleikanum, tá hann tosaði við Útvarpið týskvøldið.



*Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður og formaður Fólkafloksins*

### Skal bera til at semjast

Jógvan Sundstein heldur, at samgongan hevur tvinnir kostir at velja í.

Antin ger hon eina semju við partar av andstøðuni – tað vil siga Javnaðarflokkin – ella fer hon til Danmarkar at samráðast út frá tí, sum samgongumeirilutin kann semjast um.

Aftaná skal so eina fólkaatkvøða góðkenna samráðingarúrslitið.

Tað kann ikki koma uppá tal, at Fólkaflokkurn einsamallur skal fara at samstarva við andstøðuna í hesum málinum.

– Breiða semjan hevur stóran týdning, tí hon gevur størri meiriluta í tinginum, og eftir tí, sum eg kenni til málið, so eiga samgongan og Javnaðarflokkurin at kunna semjast. Tað er so lítið sum skilir partarnar, at teir kunnu ikki loyva sær at verða ósamdir, sigur Jógvan Sundstein.

# Unglingi skakar filmsídnaðin

*16 ára gamli norðmaðurin Jon Johansen er størsta marran hjá amerikanska filmsídnaðinum. Hann hevur avdúkað best varda loyndarmálið í hjá teimum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Sjey tey størstu filmsframleiðslufeløgini í USA og dvd-framleiðslufelagið DVD CCA hava stevnt Jon Johansen og pápa hansara.

Teirra vegna kom norska løgregludeildin Økokrim á gátt hjá Jon og teimum í síðstu viku. Feðgarnir báðir vórðu tiknir við á støðina og avhoyrdir í 8 tímar.

Báðir eru skuldsettir fyri brot á revsilógina og lógina um upphavsrættindi. Skuldsetingin er íkomin eftir, at ungi norðmaðurin, sum bløðini skýra teldusník, hevur havt virknan lut í at menna og útbreiða eitt telduforrit, nevnt DeCSS, sum kann avdúkað trygdarritingina, kotuna, á dvd-fløgum.

### Kemur dátt við

Best varda loyndarmál í filmsheiminum øllum er nevniliga trygdarkotan á framtíðartryggu dvd-fløgunum. Pengasterku framleiðslufeløgini hava hildið trygdina verið fullkomna og ógjørliga at sníkja seg inn á.

Tí hava stóru feløgini umfatandi ætlanir at fáa brúkaran at keypa sær dvd-spælara at hava í stovuni og so keypa ella leiga filmar á dvd-fløgum.

Bæði mynda- og ljóðgóðskan er framúr, og við tað at tøknin er talgild, eru leitimøguleikarnir hópin betri enn á videobondum.

Framtíðin er altso talgild og ruddar slóð fyri innrás í heimunum, har framtíðar filmar í stóran mun fara at verða sæddir. Biografar fara bert at vera á stórri plássum, har nógv fólk kemur. Restin verður í heimabiografinum.

Soleiðis hevur ídnaðurin hugsað, og tí kemur tað teimum dátt við, at ein ungur norðmaðurin kemur inn um mark og órógvar teirra viðurskifti.

### Fær stuðul

Eftir avhoyringina hjá Økokrim í Noregi, settist Jon Johansen við telduna. Á heimasíðuni hjá Slashdot skrivaði hann egnu søgu sína, um avhoyringina og skuldsetingina.

Bert skamm stund eftir høvdu fleiri hundrað, serliga teldusnillingar, lisið frásøgnina og sagt seg vilja stuðla honum peningaliga.

Amerikanski borgararættinda felagsskapurin Electronic Frontier Foundation er komin upp í málið og hevur boðið sær til at rinda allar útreiðslur fyri ein norskan sakførarar.

– Tí hetta er ikki eitt stríð um ólóglig náptak, men um brot á talufræslið, sigur talsmaður teirra við tíðarritið Wired News.



# Í býin

**- altíð eitt stað at fara**

**Streymoy**

**fk Matseðilin**
Hósdagin 3. feb.: **Bayonneskinka**
Fríggjadagin 4. feb.: **Entre Cote**
Leygardagin 5. feb.: **Rullusteik**
Mánadagin 7. feb.: **Medistapylsa**
Týsdagin 8. feb.: **Fiskafrikadellir**
Mikudagin 9. feb.: **Hakkibúffur**
**Kostnaður 30,- kr.**
***
*Seinnaparts-TILBOÐ*
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
*Matstovan í Hoyvík*

**AUTO**
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
**AUTO**
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
**AUTO 311234**

**CAFÉ NATÚR**
* * *
Staðið har vit hittast
***

**Kaggin**
Fríggjakvøldið
Føroyskur dansur
Leygarkvøldið spælir
MOONSHOT
5'arin kl. 17.00-18.30
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spæla
X-RAYS
Sosialurin - 311820

**Búff kvøld á Hotel Tórshavn**
Sjómansheimið
*leygar- og sunnukvøldið kl. 18.00-21.30*
LÆRLINGARNIR BORÐREIÐA VIÐ:
*FORRÆTTIR*
**Jákupsskjeljar** í paprikasós á frískum salati. Borðreitt við breyði.
**Innbakaður toskur** við purru sauté.
*HØVUÐSRÆTTIR*
**Boeuf Raifort** Grillaður oksabúffur við piparrótsmørið og smørdampað grønmeti.
**Flamberaður piparbúffur** við champignon, piparsós og dagsins grønmeti.
**Boeuf a'la Mode** Marineraður oksabúffur við reyðvínssós, ovnbakaði tomat/paprika eplir og grønmeti.
**Entrecote** Oksabúffur við tunnum feittkanti, borðreiddur við kryddaðum smøri og brøndkarse.
*OMANÁ*
**Bananasplit** við sjokolátusós.
**Heimagjørd íslagkøka** við friskari frukt.
*2 rættir kr. 125,- • 3 rættir kr. 142,-*
Sosialurin - 311820

TAXA
MINI BUSS 3X21

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

**NÁTT-BUSSURIN**
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
- Úr Vestmanna kl. 24
- Úr Tórshavn kl. 01
- Úr Vestmanna kl. 04
- Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

*Long drinks Café*
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

**Nor›oyggjar**

**Klaksvíkar Klubbi**
Leygarkvøldið 5/2 spæla "FLÚRAR" til dans
Sosialurin - 311820
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

**STÓRT LUNDAKVØLD Á HOTEL NORÐ**
Leygarkvøldið 5. februar kl. 19.00
*Borðreitt verður við trimum rættum*
*TIL MATNA*
*FORRÆTTUR:* Fiskatallerkur
*HØVUÐSRÆTTUR* Stokt lundabringa úr seyðtorvu
*OMANÁ:* Dessert og kaffi
*FELAGSSANGUR*
*verður undir borðhaldinum og Hans Hjalti Skaalum og aðrir undirhalda.*
*AFTANÁ BORÐHALDIÐ*
*verður farið upp á gólv. Limir úr Klaksvíkar Dansifelag luttaka.*
*BUSSAMBAND*
*Um bussur ynskist norð kl. 18.25 kann sigast frá. Bussamband er til Klaksvíkar kl. 24.00.*
*KOSTNAÐUR*
*fyri kvøldið er kr. 220,- pr. pers.*
*TEKNING*
*áðrenn fríggjadagin 4. febr. kl. 12.00 á tel. 451244 - 451070 - 286670.*
*GISTING*
*á dupultkamari kr. 550,- fyri bæði. Einkultkamar kr. 450,- fyri ein.*
Sosialurin - 311820
Hotel Norð
Tel. 451244 - Fax 451245
FO 750 Viðareiði

Halt sosialin